# Gott nýggjár




og takk fyri tað farna



## Løgreglan leitar eftir vitnum

Løgreglan í Havn vil fegin tosa við vitni til eitt harðskapsmál í Havn 3. jólamorgun í Steinatúni í Havn.

Harðskapsmálið var framman fyri lúkuna í Pizzakjallaranum í Niels Finsensgøtu 3. jólamorgun klokkan 4:45. Tveir menn, sum stóðu í køini komu til ilnar um, hvør ið skuldi keyp fyrst.

Annar maðurin sló hin so dygt, at hann fekk stórt sár oman fyri eyga og bløddi illa. Hann fór á skaðastovuna og fekk tvær pentur.

Tilburðurin var ikki meldaður fyrr enn í gjárkvøldið, og tí hevur løgreglan eingi vitni at tosa við. Maðurin, sum var sligin, kendi ikki illgerðarmannin, og hann kendi heldur eingi vitni.

Men nógv fólk vóru á staðnum, og løgreglan vil fegin tosa við fólk, sum hava sæð tilburðin. Av politistøðini siga tey, at alt hevur áhuga, og tann, ið veit okkurt at siga verður biðin um at ringja á Politistøðina í Havn, sum hevur 351448.

## Í MORGIN




Skiftandi skýloft. Landnyrðingur, 4 m/s. Turt. Hitin millum 0 og 4 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Skiftandi skýloft. Landnyrðingur, 10 m/s. Turt fyri tað mesta. Hitin 7 stig.

## LEYGARDAGIN




Skýggjað, landnyrðingur-norðan, 6 m/s, turt. Hitin 1 stig.

**Veðrið sunnudagin**
Skýggjað. Útsynningur-vestan, 3 m/s. Turt. Hitin 2 stig.

**Veðrið mánadagin**
Regn, vestan 9 m/s. Hitin 6 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ







## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 142 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -3 | **Tromsø** | 0 | **Moskva** | -5 | **Athen** | 16 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -7 | **Berlin** | -7 | **Beijing** | 6 |
| **Tórshavn** | 5 | **Oslo** | -5 | **Paris** | 1 | **New Dehli** | 15 |
| **Lerwick** | 1 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 3 | **Bangkok** | 29 |
| **Aberdeen** | -4 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 10 | **Sydney** | -- |
| **London** | 0 | **Helsinki** | -8 | **Malorca** | 11 | **New York** | -2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

25. desember — Mánin næstur jørðini
28. desember — Seinna kvarter
4. januar — Tendring

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. des | 01:04 | 13:43 | 00:04 | 12:43 | 00:19 | 12:58 | 03:04 | 15:43 | 04:04 | 16:43 | 11:58 | - | 10:58 | 23:23 | 01:19 | 13:58 | 02:19 | 14:58 | 00:49 | 13:28 | 02:04 | 14:43 |
| 30. des | 02:08 | 14:33 | 01:08 | 13:33 | 01:23 | 13:48 | 04:08 | 16:33 | 05:08 | 17:33 | 00:23 | 12:48 | 11:48 | - | 02:23 | 14:48 | 03:23 | 15:48 | 01:53 | 14:18 | 03:08 | 15:33 |
| 31. des | 02:59 | 15:26 | 01:59 | 14:26 | 02:14 | 14:41 | 04:59 | 17:26 | 05:59 | 18:26 | 01:14 | 13:41 | 00:14 | 12:41 | 03:14 | 15:41 | 04:14 | 16:41 | 02:44 | 15:11 | 03:59 | 16:26 |
| 1. des. | 03:53 | 16:20 | 02:53 | 15:20 | 03:08 | 15:35 | 05:53 | 18:20 | 06:53 | 19:20 | 02:08 | 14:35 | 01:08 | 13:35 | 04:08 | 16:35 | 05:08 | 17:35 | 03:38 | 16:05 | 04:53 | 17:20 |
| 2. des. | 04:47 | 17:14 | 03:47 | 16:14 | 04:02 | 16:29 | 06:47 | 19:14 | 07:47 | 20:14 | 03:02 | 15:29 | 02:02 | 14:29 | 05:02 | 17:29 | 06:02 | 18:29 | 04:32 | 16:59 | 05:47 | 18:14 |

Kelda. Álmanakkin 2010